# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Glottar og skuggar

Árið, sum nú fer hevur heima verið eyðkent av búskaparligari framgongd, lítlum og ongum arbeiðsloysi. Politiski stabiliteturin, sum eyðkendi tey fyrstu trý árini hjá samgonguni, hvarv so líðandi, og varð avloystur av ósemjum innan samgonguna og av einum sera harðligum tónalagi millum andstøðu og samgongu. Hetta er einki sermerkt, men er heldur hinvegin tann vanliga myndin av einum valári. Hvussu støðan verður eftir eitt val er torført at spáa um, men alt bendir á, at ein nýggj samgonga, hvør so enn fer at mynda hana, noyðist at fremja nøkur illa dámd tiltøk, til tess at tálma búskapinum, sum er um at ganga heitur. Hetta er so at siga ein luksustrupulleiki, sum ein nýggj samgonga ivaleyst fer at hava megi til vælvitandi, at illa dámd tiltøk framd fyrst í einum valskeiði sjáldan koma eini samgongu aftur um brekkur.

Venda vit eygunum móti útheiminum, so eru tað nógvir skuggar og fáir glottar, ið eyðkenna sjónina. Útlitini fyri friði í Irak eru døpur, og altjóða harðskapur og yvirgangur vinda uppá seg, og einki bendir á, at herferðin hjá vesturheiminum móti altjóða yvirgangi fer at eydnast. Átrúnaðarlig fanatisma og fundamentalisma í ymsum útgávum seta sína dám á gerandisdagin og hava hartil í stóran mun megnað at seta politisku dagsskránna í USA eins væl og í ES. Eitt endamál hjá altjóða yvirganginum er at destabilisera tey lond, sum eru sameind við USA í stríðnum móti altjóða yvirgangi. Morðið á fremsta andstøðuleiðara og demokratisku vónina í Pakistan, Benazir Butto, er eitt óhugnaligt dømi um, at henda strategi hjá altjóða yvirganginum tykist eydnast í ólukkumát. Vesturheimurin og serstakliga USA noyðast at endurskoða sína strategi við atliti til stríðið móti yvirgangi. Tað er uppá tíðina, at USA og vesturheimurin og í hesum høpi ES venda stríðnum móti sjálvari rótini til altjóða yvirgang, sum er fátækdømi, ójavni, analfabetisma og átrúnaðarlig fundamentalisma. Hetta er eitt tungt tak og krevur ein heilt nýggjan politikk, sum í hvussu so er USA við verandi politisku leiðslu ikki megnar at fremja. Kanska kemur broytingin við einum systemskifti í USA eftir forsetavalið.

Eru so eingir glottar á altjóða økinum? Jú víst eru glottar og jalig tekin. Vit kunnu nevna sum dømi, at tilvitið um veðurlagsbroytingarnar og umhvørvismál er sterkt vaksandi. Alt bendir á, at altjóða klimatoppfundurin, sum verður í Keypmannahavn í 2009, fer at gerast eitt avgerandi frambrot fyri hetta økið. Í Miðeystri er vónin um framstig í stríðnum millum Ísrael og Palestina vaksandi. Altjóða samfelagið hevur fyri fyrstu ferð í søguni tikið ábyrgd av palestinsku tjóðini og játtaðar eru tíggjutals milliardir dollars sum búskaparlig hjálp til hetta hart plagaða fólk. Sostatt er ikki alt svart í svart, og 2008 kann hóast alt væl fara at gerast árið, tá nøkur av teimum vandamiklu rákunum vendust til tað betra. Sosialurin ynskir øllum sínum lesarum og viðskiftafólki eitt gott og happadrúgvt 2008.

**Sosialurin**

## Takk fyri jólaheilsanina

Val



**POUL MICHELSEN**
Fólkaflokkurin

Anita á Fríriksmørk, Heðin D. Poulsen og Dánjal Højgaard.

Beint undan jólum (21. december) sluppu Annita á Fríðriksmørk og Heðin D. Poulsen í útvarpið at skuldseta politikkarar, sum hava egið virki fyri ikki gjalda fyri egið valstríð, men at senda rokningina víðari til sítt egna virki.

"Tað er væl kent, at politikarar senda rokningina fyri valstríðið til fyritøku sína, og tað er væl kent, at politikarar fáa fíggjarligan stuðul frá fyritøkum" Hesi orðini átti Heðin D. Poulsen, lógkønur, sum hann vist nokk kallar seg.

Heðin D. Poulsen sigur, at hann umvegis sítt politiska arbeiði veit, at fyritøkur stuðla politikarum, men at tað av góðum grundum ikki kann dokumenterast.

Annita er heldur varðin og sigur, at hon hevur varhugan av, at politikarar, sum hava egið virki, ikki gjalda valstríðið sjálvir, men lata fyritøkuna gjalda.

Eg gangi út frá, at bæði Annita og Heðin vita, at talan er um álvarsligar ákærur, og at hetta verður gjørt fyri at skaða onkran og draga persónligan fyrimun av hesum.

Eg gangi eisini út frá, at útvarpsmaðurin Dánjal Højgaard er greiður yvir, hvat hann legði upp til, og hvat, orsakað av hansara vánaligu tíðindahandfaring, stendur eftir.

Av tí at eg eigi egið virki og tí má vera millum teir politikarar, sum eru undir illgruna fyri svik, vil eg krevja av Dánjali Højgaard, Annitu á Fríðriksmørk og Heðini D. Poulsen, at tey gera henda pástandin haldfastan. Tað kann ikki vera rætt, at hesar skuldsetingar móti virkiseigarum, sum eru politikarar, skulu sleppa at hanga í leysari luft.

Tað kann heldur ikki vera rætt, at eg, sum virkiseigari, skal út at reinsa meg mótivegis skuldsetingum, sum nakrir politikarar seta fram, bert fyri at skaða aðrar og fyri at vinna sær sjálvum fyrimunir í valstríðnum, og hetta ókeypis hjálpt av almenna útvarpinum.

Hví spurdi útvarpsmaðurin ikki Heðin D. Poulsen, sum var so skrásikkur í sínum skuldsetingum, hvønn talan er um? Hví sluppu hesi bæði valevnini undan tí spurninginum?

Hví skulu hesi bæði sleppa at standa sum tey reinu og penu uppá bekostning av m.a. mær.

Eg vil fegin hava, at hesi antin ákæra meg fyri svik – tað kann ikki vera nakar trupulleiki, tí Heðin D. Poulsen veit jú, hvønn talan er um – ella eisini taka tey ákærurnar aftur.

"Her eru ongar reglur fyri, hvussu valstríðið verður fíggjað" sigur Heðin D. Poulsen. Tað er møguligt, at so er, men tað eru púra greiðar reglur fyri, hvat eitt virki hevur loyvi at gjalda og ikki. Og at gjalda fyri eitt valstríð hjá virkiseigarum er ikki loyvt, og verður tí als ikki góðtikið av grannskoðanini. Talan er her um skattasvik!

Fólk í almennum starvi, sum her er talan um, skylda fólki ið ikki livur av almennum pengum eitt sindur størri virðing.

## Føroyar mugu fordøma drápið á Benazir Bhutto

Val



**BJØRT SAMUELSEN**
Tjóðveldi

Benazir Bhutto, sum í gjár varð myrd, var ein av djarvastu politikarum á altjóða pallinum og hon læt lív sítt í stríðnum fyri fólkaræði í Pakistan.

Føroyar eiga alt fyri eitt alment og altjóða at fordøma drápið á pakistanska andstøðuleiðaran og eggja Pakistan og valdsharranum Pervez Musharraf at halda áfram við demokratisku tilgongdini. Vit mugu ikki sita passiv, men vísa, at eisini Føroyar vil gera sítt til at verja fólkaræðið móti myrkum afturhaldskreftum og fanatismu.

Hetta er ikki bert ein stór sorg fyri Pakistan og eitt ómetaliga álvarsamt álop á demokratisku tilgongdina í landinum, har val eftir ætlan skal vera 8. januar. Drápið rakar allan heimin og ber enn eitt boð um tær sterku óhugnaligu kreftir, aloftast ílatnar átrúnaðarliga fanatismu, sum stríðast eirindaleyst fyri at máa støðið undan og forða fyri fólkaræði.

Øll, ið hava møguleikan - eisini Føroyar - eiga at stuðla demokratisku rørslunum í Pakistan, soleiðis at afturhaldskreftirnar einki vinna við slíkum óhugnaligum yvirgangsálopum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.